HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

13. august 2018
Mál: 18/00649-7
Viðgjørt: PB

**Til ummælis:**

1. **Uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing**

2. **Uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 110 frá 13. desember 2006 um kærunevnd í lendismálum**

3. **Uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd**

**Freistin at lata inn ummæli er týsdagin 11. septembur 2018.**

Tey trý broytingaruppskotini hanga í stóran mun saman við uppskotinum til løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í tí føroysku náttúruni, sum varð sent til hoyringar tann 6. apríl 2018.

**AD 1**

Av tí at tann nýggja náttúrumargfeldislógin ætlandi kemur í staðin fyri partar av galdandi náttúrufriðingarlóg, verða partar av náttúrufriðingarlógini strikaðir. Saman við náttúrumargfeldislógini vil landsstýrismaðurin leggja ta broyttu náttúrufriðingarlógina til náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni at umsita, og tí verða friðingarnevndirnar eftir náttúrufriðingarlógini avtiknar og ásetingarnar um hesar strikaðar úr lógini. Seinni verður tað, sum eftir verður av náttúrufriðingarlógini, ætlandi fevnt av eini nýggjari planlóg, soleiðis at náttúrufriðingarlógin tá kann fara heilt úr gildi.

**AD 2 og 3**

Orsøkin til broytingaruppskotini er, at landsstýrismaðurin heldur tað vera skynsamt at flyta kærumálsviðgerðina eftir tí týdningarmestu náttúru- og umhvørvislóggávuni úr stjórnarráðnum í eina kærunevnd undir Føroya kærustovni. Í tí sambandi er ætlanin at víðka Kærunevndina í lendismálum, so at hon eisini fer at fevna um náttúru- og umhvørvismál.

Við broytingini í løgtingslóg um kærunevnd í lendismálum verður Kærunevndin í lendismálum víðkað við tveimum limum, sum skulu vera ávikavist náttúru- og umhvørviskønir. Samstundis verður heitið á løgtingslógini broytt til *løgtingslóg um kærunevnd í náttúru-, umhvørvis- og lendismálum*.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

Við broytingini í løgtingslóg um umhvørvisvernd fær landsstýrismaðurin heimild at áseta reglur um kæru og at avgerðir eftir umhvørvisverndarlógini og reglum ásettum við heimild í umhvørvisverndarlógini bara skulu kunna kærast til ávísa kærunevnd.

Tey trý broytingaruppskotini verða eisini løgd á heimasíðuna hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum:
http://www.himr.fo

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri